## Tvinning

Tógvið, vit vanliga brúka til troyggjur, húgvur og annað, er tvítráðað.

Eg fari at vísa ein máta at tvinna, sum ein kona í Lamba lærdi meg eina ferð í sjeytiárunum. Hon var tá gomul kona og hevði lært henda mátan frá mammu síni. Hesum arbeiðshátti havi eg sjálv havt stóra gleði av.

Hann hóskar til smærri eindir av tógvi og vísir týðiliga, hvat tvinning er.

## Soleiðis gera vit

1. Halt vinstru hond strekta fram og lat tummilin peika móti tær. Lat byrjanarendan hanga leysan eitt petti niður og vint tráðin passaliga leyst um hondina.

2. Tá ið tú hevur tømt snælduna, letur tú tann síðsta tráðendan hanga niður og fylgjast við tí fyrsta.

   Beinanvegin snara teir seg hvør um annan, soleiðis sum tvinningin eigur at vera – *umvent av spinnisnúðrinum.*

3. Vint endarnar um nokkan, sum við spinning.

4. Far upp at standa og drag dupulta tráðin so langan sum til eygnahædd, og mal snælduna *við sólini.*

5. Loys tann tvinnaða tráðin av nokkanum og vint hann á snælduskaftið inn móti rennlinum.

Halt fram á henda hátt til einki er eftir.

**Tvinnisnúður er altíð øvugtur av spinnisnúðri.**













